Leiðari fyri Virkishúsið sett:

# Eitt dreymajobb

**Beinta Árnadóttir Gregersen hevur fingið starvið sum leiðari á Virkishúsinum fyri ung í Klaksvíkø**
**– Hetta er eitt dreymajobb, sigur ein sera fegin Beinta, sum vónar at sleppa gongd sum skjótast**

VIRKISHÚS FYRI UNG
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*29 ára gamla Beinta Árnadóttir Gregersen úr Norðagøtu er júst sett sum leiðari á nýggja Virkishúsinum fyri ung í Klaksvík*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Klaksvík:**
Í summar tók Klaksvíkar býráð endaliga avgerð um at gamli Sjóvinnubankin, har kommunulæknarnir hava húsast, framyvir skal nýtast sum virkishús fyri ung undir 18 ár. Onki ungdómshús hevur verið í býnum síðani einaferð í 80unum, so í Klaksvík hevur verið fylgt við spenningi við ætlanunum fyri virkishúsið. Hósdagin frættist so, at 29 ára gamla Beinta Árnadóttir Gregersen úr Norðagøtu er sett sum leiðari fyri húsið.

### Eitt hús fyri øll

Í fyrsta umfari er ætlanin at skipa virksemið í húsinum eftir nøkunlunda sama leisti sum Margarinfabrikkin í Havn. Tað vil siga eitt royk- og rúsfrítt umhvørvi, har ung undir 18 ár hava sína dagligu gongd og kunnu taka lut í ymsum virksemi. Eisini er ætlanin javnan at skipa fyri kjakfundum og fyrilestrum um evni, sum hava áhuga hjá teimum ungu. Í hesum sambandi heldur Beinta eisini, at tey ungu áttu at fingið møguleika at læra at duga og tora at traðka fram og siga sína hugsan alment. Beinta sigur, at eftir hennara tykki skal tað verða hugskotini hjá teimum ungu sjálvum, sum seta sín dám á húsið. Tí ætlar hon, sum eitt tað fyrsta at fara inn í skúlaflokkar í Klaksvík at fregnast eftir, hvat tey ungu kundu ímyndað sær at brúkt virkishúsið til.

– Tey ungu eru full av hugskotum, so tað verður neyvan nakar trupulleiki at koma í gongd við okkurt spennandi. Men tað skal eisini vera pláss fyri bara at koma inn og slappa av og sita og práta, sigur Beinta.

Enn er ov tíðiliga at siga nakað ítøkiligt, um hvørji tilboð verða í húsinum. Men Beinta leggur áherðslu á, at hetta skal vera eitt hús, har øll kenna seg væl at koma. Hetta skal fyrst av øllum verða eitt stað, har tey ungu kunnu koma at hava tað stuttligt og hugnaligt saman, samstundis sum tey hava møguleika at læra okkurt innan til dømis tónleik, handverk og annað kreativt.

### Ymsar royndir

Beinta er BA í samfelagsfrøði og hevur harumframt lisið Kultur- og sprogmødestudier á RUC. Hon hevur nakað av royndum sum lærari og á CISV barnalegum og hevur annars verið sera virkin í tónleikasam-takinum Grót og í nógva virkseminum kring G! Festivalin.

Beinta sigur, at síðani hon flutti aftur til Føroyar fyri tveimum árum síðani, hevur hon leitað eftir einum starvi, ið líktist júst hesum, hon nú hevur fingið.

– Eg var farin at halda, at tað nokk ikki funnust slík størv í Føroyum. So hetta er onki minni enn eitt dreymajobb fyri meg, sigur ein sera fegin og spent Beinta, sum vónar at sleppa í gongd sum skjótast.

## Hentur bóklingur frá Vinnuhúsinum




*Bóklingurin Arbeiðsmarknaðurin 2005 frá Vinnuhúsinum lýsir eina røð av evnum, sum hava áhuga á flestu starvsplássum*

**Er talan um kynsligan ágang, tá eitt starvsfólk fortelur fúlar søgur ella sendir einum starvsfelaga sjoflar myndir?**
**Fá svarið á hetta og nógv annað í nýggja Arbeiðsmarknaðurin 2005, sum Vinnuhúsið gav út herfyri**

BÓKLINGUR

Í bóklinginum verða ein røð av viðurskiftum, sum hava áhuga á flestu starvsplássum, lýst nærri. Greitt verður til dømis frá, í hvønn mun ein arbeiðsgevari hevur rætt til at kanna internetnýtsluna hjá einum starvsfólki. Hvat eitt starvsfólk kann vænta sær av eini starvssamrøðu. Hvørjar skyldur ein arbeiðsgevari hevur mótvegis starvsfólkum, sum hava heimaarbeiðspláss. Nær talan til dømis er um kropsligan ella kynsligan ágang, happing o.s.fr

Harumframt verður eisini greitt frá meir yvirskipaðum viðurskiftum, so sum lóggávu, sáttmálum o.ø. Hóast onkur av evnunum eru nakað turrislig, er málbunin óvanliga snøggur og lættlisin fyri ein bólkling av hesum slagi.

Bóklingurin, ið er ókeypis, fæst umvegis heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

**ave**

## Kanna framvegis sløkkiliðsmálið

Brunanevndin hjá Klaksvíkar Kommunu kannar framvegis tilburðin eitt kvøldi síðst í september mánað, har tveir bilar hjá Klaksvíkar sløkkiliði ikki startaðu. Brunanevndin bað í hesum sambandi um skrivligar frágreiðingar frá pørtunum í málunum, og tað eru hesar, sum nú verða viðgjørdar nærri.

Beint eftir tilburðin fóru søgur at ganga um, at sabotaga var orsøkin til, at teir báðir bilarnir ikki fóru í gongd. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri og formaður í brunanevndini sigur, at tað ikki altíð er líka eyðsýnt, hví ein bilur ikki startar, og at tað tí kann verða torført at meta um, hvat býr undir hesum leysasøgunum. Tí fer brunanevndin á komandi fundi at gera av, um gitinganar um sabotagu skulu beinast víðari til politiið.



*Tað verður møguliga politiið, sum skal taka sær av málinum um sløkkiliðsbilarnar í Klaksvík, sum ikki startaðu herfyri*

**ave**

## Nýggi Smyril á framsýningartúri

Leygardagin var nýggi Smyril á framsýningartúri norðanfyri.

Fyrst gekk leiðin til Klaksvíkar, og um middagsleitið stevndi Smyril inn á Pollin. Skipið legði tó ikki at, so Klaksvíkingar fingu ikki høvið at fara umborð í hesum umfari. Rættiliga nógvir bilar vóru tó at síggja á Ánavegnum, har útsýnið yvir á Smyril var av tí besta.

Eftir vitjanina í Klaksvík, legði Smyril leiðina inn á Fuglafjørð, har skipið kom inn á fjørðin kl. 15.00. Komin væl inn á fjørðin byrjaði Smyril at floyta, og bæði bátar og bilar heilsaðu skipinum vælkomnum við at floyta aftur. Fáar minuttir seinni fór Smyril avstað aftur.



*Smyril á Klaksvík*



*Smyril á Fuglafirði*

**ave**